ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið alt um ítróttin um vikuskiftið í týsdagsblaðnum ella á alnetinum:

www.sosialurin.fo

Stríðast um málmsbýtið

Hondbóltur um vikuskiftið: Seks hondbóltsdystir verða leiktir um vikuskiftið, tríggir hjaá hvørjum kyni. Hjá kvinnunum er tað silvurið, sum spenningurin nú snýr seg um, meðan gulldysturin hjá monnunum framvegis er knallharður

JÁKUP MØRK

Seks hondbóltsdystir verða leiktir um vikuskiftið, og av hesum kann bert hin eini metast at vera uttan týdning fyri endaligu støðurnar í báðum teimum fremstu hondbóltsdeildunum her á landi.

Stjørnan kann tryggja gullið

Fyrsti dysturin hjá kvinnunum hetta vikuskiftið verður í Runavík, har VB kemur á vitjan hjá Tjaldrinum. Sum so hava liðini bæði ikki tað stóra at spæla fyri. Tjaldur hevur higartil tapt allar sínar dystir, og enda uttan iva niðast á stigatalvuni.

VB hevur meginpartin av árinum verið á fimta plássinum, og hóast tað helst eru fleiri meiningar um, at tær væl kundu havt eina betri støðu, so fáa tær ikki gjørt nakað við hetta nú.

VB hevur tó sýnt ein fyrimyndarligan stríðsanda, hóast tær stóran part av árinum einki hava havt at spælt fyri, og tískil er væntandi, at tær vinna sær tvey stig upp í heldur soltna stigaposan.

Er stigaposin hjá VB soltin, kann ikki sigast tað sama um tann hjá Stjørnuni. Longu nú er hann somikið rokaður, at klaksvíksgenturnar at kalla er føroyameistarar, og sunnudagin hava tær so møguleika at tryggja seg 100%.

Neistaliðið hevur tó eisini sítt at stríðast fyri, tá tær eru partur av silvurstríðnum, men kortini mugu Klaksvíksgentur metast um favorittar undan dystinum. Spennandi verður tó at vita, um Neistin kann gera ein vørr móti suverenu Klaksvíkingunum.

Seinasti dysturin hjá kvinnunum verður í Vestmanna, har VÍF og Kyndil bresta saman. So at siga alt árið hava hesi liðini, saman við Neistanum, verið við í silvurstríðnum, og fyri Kyndil er tad nú um at vera seinasta útkall.

Higartil í ár hevur Kyndil havt eitt sera gott tak á VÍF, men skulu silvurvónirnar varðveitast, er tó neyðugt, at tær sýna annan hugburð enn tann, sum varð galdandi seinata vikuskifti.

Klassikarin í Vestmanna

Hjá monnunum verða eisini tríggir dystir leiktir hetta vikuskiftið, og eisini her verður lagt fyri leygardagin. Tá koma føroyameistararnir av Strondum til Havnar, har teir skulu royna seg móti hoyvíkingum.

Einki er at ivast í, at strandingar eru heitir favorittar at vinna hendan dystin, og hetta er eisini alneyðugt, um teir framhaldandi skulu vera partur av FM-stríðnum.

Hoyvíkingar hava hinvegin ikki so nógv at spæla fyri, men eftir nøkur serstakliga vánalig avrik seinastu tíðina, reistust teir nakað móti Neistanum herfyri, tó at eingi stig spurdust burtur úr hesum.

Liðini bæði verða helst munandi skerd, tí fótbóltskappingin nú aftur er um at fara í gongd. Sonevnda klaksvíkskappingin verður hildin um vikuskiftið, og hetta merkir ivaleyst, at hvørki John Petersen ella Jákup á Borg, sum á fótbóltsvøllinum eru liðfelagar, verða við leygardagin.

Sunnudagin verður so aftur dystur í Havn, tá Neistin skal royna seg móti kollfirðingum. Neistin hevur higartil vunnið allar dystirnar í endaspælinum, og ilt er at ímynda sær, at kollfirðingar skulu gera nakað við hesa sigursrød.

Veikleikar vóru tó at hóma á neistaliðnum mikukvøldið, tá leikt varð móti hoyvíkingum, men hetta er helst eisini ein spurningur um motivatión.

Seinasti dysturin hjá monnum verður í Vestmanna, har seinasta útgávan á hesum sinni av stóra klassikaranum verður. VÍF tekur ímóti Kyndli, og hóast hesin dystur í ár ikki hevur avgerandi týdning fyri bæði liðini, so er einki at ivast í, at hetta er ein dystur, sum hvørgin parturin vil tapa.

Higartil hevur VÍF ligið omaná í øllum innanhýsis uppgerðunum í landskappingini, meðan Kyndil var betri, tá tað snúði seg um steypakappingina. Munurin millum liðini hevur tó verið sera tepur í øllum dystunum, og tískil hava vit helst ein sera spennandi dyst í væntu til leygardagin.

Støðan undan vikuskiftinum

1. deild, kvinnur

	dystir	v	- j	- t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Stjørnan	7	7	- 0	- 0	493	383	110	23
2 VÍF	6	4	- 0	- 2	398	356	42	15
3 Neistin	7	5	- 0	- 2	363	359	4	15
4 Kyndil	7	3	- 0	- 4	398	359	39	13
5 VB	7	1	- 0	- 6	424	452	-28	6
6 Tjaldur	6	0	- 0	- 6	285	452	-167	0

1. deild, menn

	dystir	v	- j	- t	vunnin mál	tapt málmunur	mál-	stig
1 VÍF	9	7	- 0	- 2	610	472	138	25
2 Neistin	8	8	- 0	- 0	587	496	91	25
3 StÍF	8	6	- 0	- 2	582	493	89	23
4 Kyndil	8	5	- 0	- 3	562	489	73	17
5 KÍF	9	3	- 0	- 6	468	595	-127	7
6 H71	9	1	- 0	- 8	487	597	-110	4
7 Tjaldur	9	0	- 0	- 9	504	658	-154	3

Jarnbardur til Scilly

Genturnar á Jarnbardi fara í vár at luttaka í kappróðri á Scilly-oyggjunum, og hesum sambandi verður tiltak niðri í Vágsbotni sunnudagin

JÁKUP MØRK

Seinastu tvey árini hava føroyameistararnir í tíggjumannafarsróðri luttikið í kapping á Scilly-oyggjunum, og soleiðis verður eisini í ár.

Hesu ferð verða menninir tó ikki einsamallir á ferðini, tí kvinnurnar á Jarnbardi, sum í fleiri ár hava verið í oddinum hjá seksmannaførum, hava sum kunnugt eisini boðað frá luttøku.

Savna pening

Hjá tíggjumannaførunum hevur tað verið Amarada Hess, sum hevur stuðla ferðini tey bæði undanfarnu árini, og soleiðis verður eisini í ár.

Amarada hevur eisini stuðlað Jarnbardi í teirra luttøku, soleiðis at teir hava hjálpt til við tilmelding og øðrum formalitetum, eins og genturnar sleppa at nýta bátin, sum Amarada Hess hevur latið, tá tær nú skulu venja seg við at rógva hetta slag av bátum.

Fíggjarliga partinum taka genturnar á bátinum sær av, og í hesum sambandi verður skipað fyri tiltøkum um vikuskiftið.

Sunnudagin fer áttamannafarið, Knørrur, at rógva aftur og fram millum Vágsbotn og Molan í fýra tímar, og í hesum sambandi hava fólk møguleika at stuðla við ávísari upphædd fyri kilometurin.

Eftir róðurin verður drigið millum stuðulsbrøvini, og verða tríggir vinnarar funnir, sum fáa ávíkavist 2.000, 1.000 og 500 kr.

Fiskibrunnur verður fyri yngstu áskoðararnar, meðan tey vaksnu kunnu vinna sær nakrar kakur, ella bara hugna sær við kaka og bollum.

Umframt omanfyristandandi, skipar felagið eisini fyri framsýning, nú 15 ár eru liðin, síðani róðrafelagið varð sett á stovn.

Hesi 15 árini hava manningarnar vunnið hópin av róðrum og heitum, og verða steyp, myndir og annað at síggja hesum viðvíkjandi, umframt at Brendan, sum er venjingarbáturin til komandi kappingina, verður at síggja.

Nýggj karate-lið

Havnar Karate Felag hevur nú í eitt ár havt barnalið, og mánadagin verður høvið hjá fleiri børnum at tekna seg

JÁKUP MØRK

Karate er helst ikki tann ítróttin, sum fær mestu umtaluna her á okkara leiðum. Nøkur ár eru tó kortini liðin, síðani fólk her á landi, fóru undir at íðka hesa ítrótt.

At byrja við var hetta kanska ikki undir so skipaðum viðurskiftum, men fyri 10 árum síðani varð Havnar Karate Felag sett á stovn.

Mest vaksin at byrja við

Fyrstu árini var tað at kalla bert vaksin fólk, sum høvdu nøguleika at luttaka í hesi venjing, tó at nøkur ungfólk sjálvandi eisini taldust millum luttakararnar.

Ein teirra, sum tá byrjaði venjingina, er Tonny Brimsvík, sum alla tíðina hevur hildið á við ítróttini. Í dag er hann formaður í Havnar Karate Felag, umframt at hann eisini er venjari, og millum íðkarar í Føroyum, man hann helst vera tann, sum er komin longst við ítróttini.

Fyri nøkrum árum síðani búleikaðist Tonny í Danmark, og tá eydnaðist tað honum at fáa eitt fimta pláss í kappingini um danska meistaraheitið.

Fáa tey ungu við

Tonny hevur fyrr greitt frá, at tað er sera týdningarmikið at fáa børnini við í hesa ítrótt á ungum aldri, soleiðis at tey tíðliga læra, hvat ítróttin hevur at geva teimum.

Tískil varð seinasta ár farið undir at venja barnalið, og hetta hevur vístur sig at vera sera vel umtókt millum luttakararnar. Nú hevur fyrsta liðið so vant í eitt ár, og hava øll átta á hesum liði nú fingið orange litta beltið.

Nú er so høvi hjá nýggjum luttakarum at tekna seg. Mánadagin, 13. mars, byrjar nýtt lið, og tá eru øll væl komin at royna seg.

Fyri áhugaðum kann upplýsast, at vant verður tríggjar ferðir um vikuna, og at fyrsti mánaðurin verður roknaður sum royndartíð, og tískil er ókeypis fyri luttakararnar.

Venjingin fer fram í hølunum hjá Argja Róðrafelag.

Ungdómslandslið í judo

Judolandslið fyri ungdómseildina er nú sett, og fyrsta uppgávan verður, tá liðið skal umboða Føroyar í altjóða judokapping í komandi mánaði

Judosamband Føroya hevur nú sett ungdómslandsliðið, sum skal umboða Føroyar í altjóða judokapping í Danmark í næsta mánað.

Til landsliðið eru úttiknir: Jóhan Heini Poulsen, Jákup Andrias Thomsen, Christoffur Olsen og Tórður Strøm úr Havnar Judofelag, og Petur Sigurð Johannesen, Hjalmar Johannesen og Rólant Waag Dam úr Sunda Judofelag.

Landsliðsvenjari er Gunnar Hansen úr Havnar Judofelag.

Landsliðið skal luttaka í stórari altjóða judokapping í Aalborg á páskum. Hetta er ein kapping nevnd Limfjords Cup við luttøku úr øllum norðanlondum, Týsklandi, Hollandi, Belgia, Pólandi og aðrastaðni frá eisini.

Venjing

Í samband við fyrireikingar til hesa kappingina skipaði Judosambandið fyri serligum venjingarvikuskifti í Havn herfyri, har Búgvi Poulsen, sum er tann mest royndi føroyski judoíðkarin, var høvuðsvenjari.

Venjingin var frá fríggjakvøldi til sunnukvøld, og allir teir bestu unglingarnir luttóku í venjingini. Venjingin varð løgd til rættis soleiðis, at luttakararnir komu ígjøgnum bæði gólv og standandi venjing, eins og venjing við halditøkum og at koma leys úr halditøkum.

Luttakaranir lótu sera væl at venjingini og søgdu seg fáa hópin burtur úr.

Og tað skuldi eisini verið møguleikar fyri tí. Tí venjarin, Búgvi Poulsen, er ikki hvør sum helst innan føroyskt judo. Hann hevur fleiri ferðir verið Føroyameistari í judo, nakrar ferðir hevur hann verið nr. 3 í Norðurlandameistarakapping, eins og hann bæði hevur verið nr. 3, 2 og 1 í Danmarksmeistarakapping.

Eisini í heyst og vetur hevur gingið væl hjá Búgva. Seinasta heyst varhann útleigaður frá felag sínum, Hillerød, til felagið í Vejen, sum var í altjóða kapping í Magdeburg í Týsklandi, har liðið gjørdist nr. 3.

Seinni gjørdist Búgvi Sjællandsmeistari í vektbólkinum -81 kg., og í einari altjóða kapping, sum nevnist Hillerød Træf, gjørdist Búgvi eisini nr. 1 í -81 kg.

Av avbjóðingum fyri framman hjá Búgva kunnu nevnast DM og NM, sum vera ávikavist í apríl og mai mánað.

SJ

Ungdómslandsliðið við venjarum. Standandi frá vinstru: Búgvi Poulsen, venjari, Petur Sigurð Johannesen, SJF, Jóhan Heini Poulsen, HJF, Jákup Andrias Thomsen, HJF, Gunnar Hansen, landsliðsvenjari. Húkandi: Rólant Waag Dam, SJF, Hjalmar Johannesen, SJF, Tórður Strøm, HJF og Christoffur Olsen, HJF

Flogbóltur um vikuskiftið

Flogbóltssambandið hevur í tíðindaskrivi umrøtt tær broytingar, sum hava verið í kappingini hetta árið, og niðurstøða teirra er yvirhøvur positiv

Hetta vikuskiftið er seinasta leikumfar í landskappingini í flogbólti. Eftir skipanini eru dystir eisini næsta vikuskifti, men teir dystirnir verða framskundaðir, tí leygardagin 18. mars verður steypafinala.

Ringa veðrið hevur havt við sær, at nakrir dystir eru útsettir, men væntandi verða allir leiktir hetta vikuskiftið, og í seinasta lagi áðrenn komandi vikuskifti. Í yngru deildunum er tað soleiðis, at føroyameistaraskapurin verður avgjørdur í eini vikuskiftiskapping. Tann kappingin verður vikuskiftið 01. og 02. apríl.

Kappingin nógv broytt

Hetta kappingarárið hevur havt nógvar broytingar við sær. Spæliskipanin er nógv broytt, og nú verður leikt í tveimum hálvleikum, og 10 min. steðgur er millum hálvleikirnar Tvey sett eru í hvørjum hálvleiki. Spælt verður upp í 21 í hvørjum setti og hvør bóltur telur (running score).

Hesar broytingarnar góvu nakrar trupulleikar fyrst í kappingarárinum, men sum frá leið hevur gingið væl. Henda spæliskipanin verður brúkt í flestu norðanlondunum, og er ein royndarskipan, sum norðurlond hava tikið seg saman um. Á aðalfundinum hjá Flogbóltssambandinum, sum verður í apríl er ætlanin at umrøða nýggju skipanina, og um neyðugt verða broytingar gjørdar.

Tað eru eitt sindur ymiskar meiningar um, um nýggja skipanin er betri enn tann gamla, har m.a. spælt varð um servuna. Kappingin í meistaradeildunum hevur ikki verið serliga spennandi hetta kappingarárið, men nøkur heilt óvæntað úrslit hava verið, og tað skal vera ein fyrimunur við nýggju skipanini. Tey veikaru liðini hava betri møguleika at vinna nú enn tey høvdu fyrr og burtursæð frá Fleyr hjá monnunum og Mjølni hjá kvinnunum, so hevur kappingin millum hini liðini verið sera spennandi.

Steypafinalan

Ein onnur broyting í flogbóltskappingini er eisini, at ein steypafinala verður.

Hildið hevur verið, at ein steypafinala hevur mangla í flogbóltinum, og samtykt varð tí, at ein royndar skuldi gerast hetta kappingarárið. Hetta fyrsta árið hevur steypakappingin bara verið fyri meistaradeildarliðini.

Liðið, sum vann Fleyrkappingina, skuldi spæla ímóti liðnum, sum vann Mjølnirkappingina. Hjá monnunum vann Fleyr báðar kappingarnar og Mjølnir og Fram hava spælt hálvfinalu, tí Fram var í finaluni í Fleyrkappingini og Mjølnir í Mjølnirkappingini. Úrslitið av hesum dystinum var, at Mjølnir vann, og finalan hjá monnunum stendur tí millum stórfeløgini bæði Fleyr og Mjølnir.

Hjá kvinnunum var støðan tann sama, tí Mjølnir vann báðar kappingarnar. Fleyr og Dráttur spældu tí hálvfinalu, og tann dystin vann Dráttur.

Høllin á Hálsi er vertur

Finalurnar báðar verða leygardagin 18. mars. Tann fyrra verður kl. 15.00 og tann seinna beint eftir, uml. kl. 17.00. Finalurnar verða spæltar í høllini á Hálsi.

Vanligt er ikki at spæla flogbólt í hesi høllini, men av tí at eingin sitipláss eru í Gundadalshøllini til áskoðararnar, verða dystirnir á Hálsi. Dystirnir verða spældir á langvølli, t.e. at áskoðararnir síggja inn á síðuna á vøllinum.

Teir dystir í meistaradeildini, sum hava verið leiktir í ítróttahøll hetta kappingarárið hava verið á langvølli. Tað ger, at spælið verður øðrvísi og t.d. er møguligt hjá leikarunum at fara langt aftur at serva. Jugoslaviski venjarin hjá Mjølni, Borko Ilic, dugir hetta serliga væl, og hevur tað verið avgerandi í dystum í vetur.

Eisini er høllin høg og breið, og tí koma bóltarnir sjáldan upp í loftið og til ber hjá leikarunum at renna langt út og fáa bóltin aftur í spæl.

Beinleiðis í sjónvarpi

Sjónvarpið fer at senda beinleiðis frá finalunum. Tað er ikki oftari enn so, at til ber at síggja flogbólt í sjónvarpinum, so øll tey, sum ikki kunnu koma í høllini, hava møguleikan at síggja bestu liðini í føroyskum flogbólti.

Hjá monnunum stríðast Fram og Mjølnir um rætting til at ogna sær silvurmerkini

Dystir um vikuskiftið

Meistaradeild kvinnur

Fríggjadagin 10. mars
Á Giljanesi kl. 18.00: Dráttur-Mjølnir
Í Trongisvági kl. 21.00: TB-ÍF

Leygardagin11. mars
Í Gundadalshøllini kl. 13.30: Fleyr–Mjølnir

Meistaradeild menn

Fríggjadagin 10 mars
Í Sørvági kl. 18.00: SÍ-Mjølnir
Á Kambsdali kl. 19.30: ÍF-Fram

Leygardagin 11. mars
Í Gundadalshøllini kl. 15.30: Fleyr-Mjølnir

Støðan undan vikuskiftinum

1. deild, kvinnur

	dystir	v	- t	vunnin sett	tapt sett	sett-munur	stig
1 Mjølnir	14	13	- 1	27	2	25	19
2 TB	15	8	- 7	19	18	1	12
3 Dráttur	15	8	- 7	19	18	1	12
4 Fleyr	15	5	- 10	11	23	-12	7
5 ÍF	15	3	- 12	11	26	-15	4

1. deild, menn

	dystir	v	- t	vunnin sett	tapt sett	sett-munur	stig
1 Fleyr	15	15	- 0	30	3	27	22
2 Mjølnir	14	8	- 6	19	14	5	12
3 Fram	15	8	- 7	17	17	0	12
4 ÍF	15	3	- 12	8	25	-17	5
5 SÍ	15	3	- 12	11	26	-15	3